VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fleyr til gul av vestri ella av ymsum ættum, yvirhøvur turt og sólglottar, men eisini mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 srig.



Veðrið hósdagin:
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og norði og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt æli. Hitin millum 6 og 9 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og leygardagin okkurt æli, men sunnudagin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

Rullandi redaktiónin veksur

Umframt bilarnar telur rullandi flotin hjá Sosialinum nú eisini tveir skutarar

RULLANDI REDAKTIÓN
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Her stendur so bilflotin hjá Sosialinum. Frá vinstru Snipp, Snapp, Snar, Snoddi og Snati
Mynd: Jens Kristian Vang

Fólk kring landið síggja javnan teir eyðkendu svørtu bilarnar hjá Sosialinum, tá blaðfólk og myndamenn eru á vitjan á bygd. Og tað hendir ofta.

Eitt er, at Sosialurin hevur eina redaktión í Klaksvík, sum er mannað fast tveir dagar um vikuna, men umframt tað verður vitjað aðrastaðni í landinum.

Tað munnu vera fá støð í Føroyum, har tað er koyrandi, at svørtu Sosialbilarnir ikki hava verið. Eisini á oyggjum sum Kallsoynni hevur Snoddi, sum er navnið á bussinum hjá Sosialinum, verið.

Sosialurin hevur ein blaðmann, sum í serligan mun tekur sær av bygdunum, og tað er Snorri Brend. Hann er fast í Klaksvík mikudag, men vitjar javnan serliga tær smærru bygdirnar so sum Norðdepil, Múla og Bø.

Snoddi er serliga væl egnaður til júst hetta brúkið, tí hann hevur borð aftanfyri forsetrini, og tí ber væl til at skriva á teldu har. Eisini ber til at senda á internetinum úr Snodda.

Sum nakað nýtt hevur Sosialurin eisini fingið tveir skutarar, sum eru sera væl egnaðir til styttri túrar í býnum – tá veðrið er til vildar.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	1
Nuuk	2
Qaqortoq	5
Ammassalik	5
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	11
Tórshavn	9
Lerwick	11
Aberdeen	17
London	23
Tromsø	--
Bergen	15
Oslo	--
Stokkhólm	16
Keypmannah.	17
Helsinki	12
Moskva	9
Berlin	20
Warzawa	14
Kiev	11
Bukarest	15
Paris	24
Madrid	24
Róm	21
Malorca	25
Athen	18
Malta	20
Tunis	22
Beijing	24
New Dehli	36
Bangkok	34
Jakarta	--
Sydney	19
New York	21
Miami	28
Los Angeles	16
Meksikobýur	25
Panama	32
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	17

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1029 hPa. millum Íslands og Føroya viknar nakað.



Í dag:
Hátrýstið yvir Føroyum fer spakuliga í útsynning og viknar. Lágtrýstið yvir Norska Havinum fer í landsynning og brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum hósdagin

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 7/5 kl. 06⁰⁰ – 8/5 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,9°
Minsti hiti máldur í mai: -9,9° - Mesti hiti máldur í mai: 18,3°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,0 mm – mált frá 3/5 kl. 06⁰⁰ – 4/5 06⁰⁰.
Avfallið higartil í mai: 15 mm

Alt um harmonikur

www.simme.eu

VESTFALLSKYRRINDI

5. mai Tendring
6. mai Mánin næstur jørðini
12. mai Fyrra kvarter

Kelda: Ámanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
8. mai	9:50	22:22	8:50	21:22	9:05	21:37	11:50	-	0:19	12:50	8:05	20:37	7:05	19:37	10:05	22:37	11:05	23:37	9:35	22:07	10:50	23:22
9. mai	10:52	23:22	9:52	22:22	10:07	22:37	0:22	12:52	1:22	13:52	9:07	21:37	8:07	20:37	11:07	23:37	-	12:07	10:37	23:07	11:52	-
10. mai	11:49	-	10:49	23:16	11:04	23:31	1:22	13:49	2:22	14:49	10:04	22:31	9:04	21:31	-	12:04	0:37	13:04	11:34	-	0:22	12:49
11. mai	0:16	12:41	11:41	-	11:56	-	2:16	14:41	3:16	15:41	10:56	23:21	9:56	22:21	0:31	12:56	1:31	13:56	0:01	12:26	1:16	13:41
12. mai	1:06	13:43	0:06	12:43	0:21	12:58	3:06	15:43	4:06	16:43	11:58	-	10:58	23:35	1:21	13:58	2:21	14:58	0:51	13:28	2:06	14:43